

# NIELS OG SALLYVER giftust tvær ferðir

**- NÚ VAR EG VORÐIN NÆSTAN 40 ÁR, OG TÁ EG SO ENDILIGA SKULDI GIFTAST VIÐ SALLYVER, MÁTTI TAÐ BARA HENDA TVÆR FERÐIR - EINA FERÐ HER Í FØROYUM OG EINA FERÐ Á FILIPSOYGGJUNUM, SIGUR NIELS NATTESTAD. TEY BÆÐI BÚGVA NÚ Í MIÐVÁGI, OG SKULU GERAST FOREVLDUR Á FYRSTA SINNI UM MÁNAÐARSKIFTIÐ APRÍL/MAI**

KÆRLEIKI

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

**Miðvágur**: Tað merkist beinanvegin at her búgva fólk við áhuga fyri tónleiki.

Úr stovuni hoyrist ljómandi country-tónleikur, og við júst somu gleði sum hesin tónleikurin skapar, standa tey bæði Niels og Sallyver og taka ímóti umboðnum fyri tíðindatænastuna.

Endamálið er at fáa savnað tilfar saman til eina grein um, hvussu tað ber til at ein bygdadrongur úr Miðvági fann sær konu úr býnum Puerto Princesa á oynni Palawan, sum liggur 700 kilometrar sunnanfyri høvuðsstaðin Manila.

Fyri tveimum árum var nevniliga alt sum bendi á, at Niels framvegis skuldi búgva einasamallur í stóru húsum sínum í Mikkjalsgøtu 10, norðarlaga í heimbygdini.

Men ein heimasíða, ein profilur við eini mynd og felags áhugamál teirra gjørdu sítt til, at ástir runnu saman millum tey bæði.

Hetta kom helst óvart á bæði tvey. Tí sum Sallyver tekur til:

- Eg hvørki droymdi ella hugsaði nakrantíð um at gifta meg við einum fremmandum manni. Og eg hevði heldur ongar ætlanir um at flyta langt burtur frá familju míni.

- Men eg veit ikki. Tá Niels kom inn í myndina, broyttist alt. Eg fylgdi bara tí, sum Gud vildi hava meg til at gera, greiðir 26 ára gamla Sallyver Caabay frá, og sum nú kann leggja "Nattestad" aftrat eftirnavni sínum.

Stillisliga kemur tað frá Nielsi: - Eg helt bara, at hon sá gott út!

## Fekk góðan kommentar

Einhvør kærleikssøga hevur sína byrjan og sína orsøk, og onkutíð eisini ein millummann. Í førinum hjá Nielsi og Sallyver var hesin millummaður internetið.

- Ja, ein dagin fyri tveimum árum síðani kom eg fram á eina mynd av henni á internetinum. Eg sá beinanvegin, at hon var sera vøkur, greiðir Niels brosandi frá.

Myndin av vøkru kvinnuni nart við hjartað hansara, og hann vildi fegin fáa meiri at vita um hana. Tíbetur fyri hann greiddi hon eisini eitt sindur frá sær sjálvum á sínum profili.

- Eg svaraði henni aftur, og gav henni ein góðan kommentar. Og hon svaraði beinanvegin aftur.

Sallyver skrivaði m.a. at hon var virkin í samkomu síni sum lovsangsleiðari. Og tá Niels segði henni, at hann var eisini virkin sum tónleikari í síni samkomu, var beinanvegin at tey fóru at samskifta um tónleik, samkomuarbeiði og onnur felags áhugamál.

Nú var fyrsti leikurin framdur. Spurningurin var, hvør átti næsta leikin. Hann átti Niels. Og hann varð eisini tikin skjótt.

## Vælkomin at steðga

Sohvørt sum tey samskiftu, fór at nærkast til páskir. Og so fekk Niels eitt hugskot: Hví ikki fara yvir til Filipsoyggjarnar at vitja Sallyver?

- Eg fór einsamallur avstað, líkasum fyri at vita, hvussu tey livdu. Og tað má eg siga, at eina slíka móttøku sum eg fekk, skal ein leita leingi eftir. Eg búði hjá teimum, og tey vistu nærum ikki, hvørjum beini tey skuldu standa á. Her var eisini sera nógv at síggja, tí júst Palawan